## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Dagsstovnurin á Hamrinum alment tikin í nýtslu



*Dagsstovnurin á Hamrinum er ein sera snotisligur bygningur sum J.P. Gregoriussen, arkitektur, hevur teknað, og Sp/f Búsetur hevur staðið fyri arbeiðinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hósdagin 4. desember bjóðaði Mentamáladeild Tórshavnar býráðs til almenna móttøku á Dagsstovninum á Hamrinum á Argjum í sambandi við at stovnurin alment varð tikin í nýtslu**

Til móttøkuna vóru børn og foreldur, teir sum høvdu bygt húsið og umboð fyri Tórshavnar Býráð.

Borgarstjórin, Jan Christiansen, beyð vegna Tórshavnar Býráð, øllum at vera vælkomin og segði frá um stovnin og egnileikarnar við stovninum.

Heðin Mortensen, formaður í Mentamáldeildini, helt eisini røðu.

Leiðarin á stovninum, Elisabeth Henriksen, segði at tey høvdu fingið sera góðar karmar at arbeiða undir - bæði innandura og ikki minst uttandura, av tí at stovnurin liggur so væl fyri uppi í haganum.

Terji Rasmussen, tónleikari, spældi og sang saman við børnunum.

Á stovninum eru fýra stovur til barnagarðs- og vøggustovubørn. 36 barnagarðsbørn, har 18 eru á hvørjari stovu, og 24 vøggustovubørn, har 12 eru á hvørjari stovu. Fyrstu børnini komu inn á stovnin 15. juni í ár, meðan almenna móttøkan hevur bíða til liðugt var uttan um húsini.

Dagstovnurin á Hamrinum er ein sera snotisligur bygningur sum J.P. Gregoriussen, arkitektur, hevur teknað, og Sp/f Bústetur hevur staðið fyri arbeiðinum.

Ætlanin við stovninum er, eisini at grannarnir og eigarafelagið á Hamrinum kunnu brúka húsið til felags tiltøk.

Á stovninum starvast átta pedagogar og sjey hjálparfólk.



*Móttøka á Dagsstovninum á Hamrinum, f.v. Jógvan Arge, býráðslimur, Jan Christiansen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, og Elisabeth Henriksen, leiðar á stovninum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Terji Rasmussen, tónleikari, spældi og sang saman við børnunum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Absalon Matras:

# 30 túrar til Rumenia



Mánadagin 10. november kom klaksvíkingurin Absalon Matras heim aftur frá enn einum túri í Rumenia. Hetta var túrur hansara nummar 30.

Við á ferðini hesaferð vóru eisini: Marjun og Leivur Nattestad úr Miðvági, Betty á Høgabóli úr Miðvági og Ansgar Hansen úr Klaksvík.

Absalon sigur við Kirkjuligt Missiónsblað, at hjálpin hesaferð var veitt einum øki norðast í Rumenia á markinum til Ukraina, og er hetta ein tann fátækasti parturin í øllum landinum.

»Kl. 1.00 um náttina komu vit eftir einum ógvuliga vánaligum vegi til tað fjarskotnu bygdina í Norðurrumenia. Har var so fátæksligt at kommunan ikki hevði ráð til at hava gøtuljósini tendraði, men tá við komu inn í bygdina, tendraðu ljósini. Tey hava ivaleyst sæð fram til, at vit komu. Fólk vóru ógvuliga glað fyri hjálpina og bóðu okkum heilsa heim og takka hjartaliga fyri alt« sigur Absalon við blaðið.

Ferðin gekk væl og Absalon takkar fyri allan stuðul og forbøn.

Farið varð nýggjan túr til Rumenia 14. november. Hesaferð gekk leiðin til Timisuara.

*Kelda: Kirkjuligt Missiónsblað nr. 10 2003*

# Sosialurin eitt ár í Vágum



*Edvard Joensen, blaðmaður á redaktións Sosialsins í Sandavági, Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sørvági og Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum*

Í dag er eitt ár síðani, at redaktiónin hjá Sosialinum í Sandavági læt upp.

Hendan lokalredaktiónin er tann fjórða hjá Sosialinum, sum framman undan hevði redaktiónir í Suðuroy, í Klaksvík og í Saltangará.

Sum eina roynd betur at fevna um landið alt, hevur Sosialurin miðvíst roynt at fest røtur kring um í landinum.

Tann 9. desember í fjør – dagin fyri at fasta sambandið varð tikið í nýtslu – læt so redaktiónin upp, og hevur Edvard Joensen mannað hana síðani.

Blaðfólkini á lokalredaktiónunum røkja fyrst og fremst tíðindatilfar úr økjunum, men tey taka eisini hond í at hjálpa til hjá høvuðsredaktiónini á Argjum.

Stjerne for aften:

# Gunnar Mikkelsen vann kappingina



*Mynd: DR*

**Seinasta fríggjakvøld stóð hálvi føroyingurin, Gunnar Mikkelsen, sum vinnari av kappingini "Stjerne for en aften" við 27 prosentum av atkvøðunum**

Á heimasíðuni hjá DR stóð at lesa: »21 årige Gunnar Mikkelsen sang sig ind i danskernes hjerter og blev dermed vinder af Stjerne for en aften«.

Gunnar fylti 21 ár 29. oktober, hann er føddur og uppvaksin í Vestbjerg, 14 km norðanfyri Aalborg. Eftir at hava gingið eitt ár í 10. flokki á eftirskúla á Mariager gekk hann í trý ár á Aalborg Katedralskole og tók studentsprógv har.

Mamman eitur Kristianna Mikkelsen, hon er dóttir Ebbemiu og Gunnar Holm Jacobsen. Pápin, Jørgen Mikkelsen, er dani, ættaður frá Samsø.

Gunnar búði í Berlin, áðrenn hann fór til Kanada í mai mánað í ár. Har búði hann á eini ranch, til hann kom aftur til Danmarkar nú í oktober. Tað var pápin sum fekk í lag at senda ein flogu inn til »Stjerne for en aften«.

Fyrru kappingina vann Guðrun Sólja Jacobsen, og nú vann Gunnar hesa. Sigast má at føroyingar hava staðið seg væl í hesi kapping.

### Dagurin

**9. desember. Rólvur.** Teir vita einki halgimenni at navni Rólvur ella Rudolf. Navnið er komið upp í álmanakkan í 1727.

Navnið er týskt, sett saman av *hrodr*, ið merkir heiður og *wulf*, ið merkir úlvur.